# Poul Michelsen byggir út



*Nýbygningurin hjá Pouli Michelsen varð reistur hósdagin. Talan er um eina tvífaldan av verandi plássi, ið heilsølan húsast í*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Heilsølan hjá Poul Michelsen hevur vegna plásstrot bygt út. Talan er um eina tvífaldan av núverandi plássi**

ÚTBYGGING
*Stefan í Skorini*

Heilsølan hjá Pouli Michelsen byggir í hesum døgum út. Og hetta er ikki hissini útbygging. Talan er nærum um eina tvífaldan av tí fermetratali, sum fyritøkan í løtuni hevur at arbeiða undir.

Hósdagin vórðu nýggju bygningarnir reistir, og teir eru 1.500 fermetrar til støddar. Heilsølan fer eftir útbyggingina at hava 3.300 fermetrar til goymslu-, framleiðslu- og skrivstovuhøli.

Nýbyggingin umfatar eina frystigoymslu, ið er 2.500 rúmmetrar til støddar. Harumframt er ein nýggj køligoymsla, sum er 400 rúmmetrar. Eisini fær heilsølan eina størri turrgoymslu til 900 plattar og 360 fermetrar til parkeringskjallara.

P/F Poul Michelsen sigur í tíðindaskrivi, at høvuðsorsøkin til útbyggingina er økt virksemi seinastu árini. Men fyritøkan vil eisini lúka øll heilsufrøðilig krøv, sum matvørulógin krevur og fer at krevja av øllum, ið fáast við handil og flutning av matvørum í framtíðini.

Við nýggju bygningunum kann fyritøkan eisini veita viðskiftafólki eina betri tænastu.

# Landið »stjól« Gamla Apotek frá Restorff-ættini



*Soleiðis sá út við Áarvegin fyri hálvari øld síðani. Upprunaliga átti Restorffs-ættin urtagarðin, har Juhl. apotekari, bygdi apotek og medisinfabrikk í 1934*

**– Vit hava síðani 1949 javnt og samt roynt at fáa tiknu ognirnar hjá okkum aftur, sigur Johan Restorff, sum frá løgtingsformanninum hevur fingið ábending um, at Hotel Hafnia møguliga kann keypa Gamla Apotek, tá løgtingið flytir inn í nýggju hølini í telefonverksbygninginum**

OGNARTØKA
*Eirikur Lindenskov*

Í 1949 keypti Christian Dahl-Restorff ognina, sum í dag verður rópt Gamla Apotek á Áarvegnum í Havn. Men Christian Dahl-Restorff slapp ikki at eiga ognina longur enn í nakrar dagar, tí Føroya Landsstýri ognartók ognina.

Søgan er tann, at Restorff-ættin í 1934 seldi burtur av ognunum við Áarvegin í Havn. Ovasti parturin av ognini var urtagarður, sum lá niðan móti Vaglinum.

Christian Dahl-Restorff hevði ætlanir at fara undir handilsvirksemi, handilin Tubbak, sum eldri havnarfólk minnast, men honum tørvaði pengar.

Mamma Christians, Johanna, gjørdi tá av at selja urtagarðsøkið til Juhl, apotekara, sum bygdi apotek og medisinfabrikk á økinum.

Fyri at tryggja sær møguleikan einaferð seinni at kunna fáa ognina aftur í ættina, treytaðu Christian og mamman sær forkeypsrætt, sum varð tinglisin. Sølan varð bundin við tinglisnum servituttum, sum m.a. bara loyvdu apote- og medisinframleiðslu.

Í 1949 gevst Juhl apotekari við virksemi sínum og vildi selja apoteksognina. Tá gjørdi Christian Dahl-Restorff forkeypsrættin galdandi og keypti ognina.

Men landsstýrið ognartók tá ognina frá Christiani Dahl-Restorff – ella sum tey ofta hava sagt, landið stjól ognina frá REstorffsættini.

Nú um dagarnar var borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, í útvarpinum, har hann tosaði um, at eitthvørt virksemi átti at verði í Gamla Apoteki, nú løgtingið ikki fer at hava tørv á húsinum longur.

Johan Restorff, stjóri á Hotel Hafnia, hevur í hesum sambandi sent út kunningarskriv um søguna hjá gomlu Restorff-ognin, og dylur hann ikki fyri, at tey fegin vilja keypa ognina aftur.

– Vit hava síðani 1949 javnt og samt roynt at fáa gomlu – tiknu – ognirnar hjá okkum aftur. Umsóknir og tilfar í hesi søk hava Føroya Landsstýri og Føroya Løgting liggjandi, og málið er teimum ikki ókunnugt, sigur Johan Restorff, stjóri á Hotel Hafnia, sum er sonur Christian Dahl-Restorff, sála.

– Seinasta áheita okkara til Føroya Løgting um Gamla Apotek var gjøgnum advokat okkara, Halgir Winther Poulsen. Hann vísir á og ger Føroya Løgtingi kunnugt, at Restorff á Hotel Hafnia, framhaldandi hava áhuga í at fáa tiknu apoteksognina við Vaglið aftur, sigur hann.

Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, hevur tó givið Johan Restorff eian ábending um, at samráðingar kunnu takast upp, tá málið við umbygging av løgtingshúsi og gomlu telefonstøðini eru komin longur áleiðis.

Vit á Hotel Hafnia bíða bara eftir fundarboðum, sigur Johan Restorff.

# ítróttur

Nr. 25 • mikudagur • 6. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Allan Joensen givið avboð



*Evnaríki klaksvíkingurin Allan Joensen hevur givið avboð til landsliðið. Hann vónar, at hetta ikki fer at fáa avleiðingar í framtíðini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Landsliðsvenjarin hevur fingið enn eitt avboð, nú landsliðið í dag fer til Kypros á venjingarlegu. KÍ-leikarin Allan Joensen hevur boðað frá, at hann ikki fær verið við**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Virkandi landsliðsvenjari Jógvan Martin Olsen hevur ein heldur tunnan hóp við sær á ferðina til Kypros. Enn ein royndur leikari hevur givið avboð.

Talan er um Allan Joensen, sum vegna skaða ikki hevur verið við í landsliðshitanum í fleiri ár. Orsøkin til hansara avboð er persónlig viðurskifti, sum hava við sær, at evnaríki klaksvíkingurin ikki fær verið við. Hetta stendur at lesa á heimasíðuni hjá KÍ.

Allan Joensen sigur seg harmast støðuna, men tað hann var noyddur at geva avboð. Hann vónar, at hetta ikki minkar um hansara møguleikar á landsliðnum framyvir.

Jógvan Martin Olsen hevur sostatt fingið fleiri avboð til hesa ferðina. Aðrir landsliðsleikarar, ið ikki eru við, eru Hans Fróði Hansen, Jens Kristian Hansen, Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Súni Olsen, Óli Johannesen, Jákup Mikkelsen, Julian Johnsson, Christian Høgni Jacobsen og nú Allan Joen sen.

# Føroyingar til EM í bridge



*Tey venja dúgliga til EM í bridge í summar. Frá vinstru Marjun Restorff, Hans Jákup Petersen, Arnleyg Mikkelsen og Arnbjørn Sivertsen*

**Tvey lið úr Føroyum fara í summar til Italia at luttaka í EM í bridge. Talan er um eitt kvinnulið og eitt manslið, ið fara at umboða Føroyar**

BRIDGE
*Stefan í Skorini*

Í sambandi við EM í Italia í summar hevði Føroya Bridge Samband boðað frá luttøku við einum liði. Samstundis heittu føroyingar á italska sambandið um at útvega teimum bíligt uppihald.

Hesum játtaðu italienarar við tí treyt, at føroyingar eisini meldaðu eitt kvinnulið til EM-kappingina.

Italska bridgesambandið vísti vælvild, av tí at hetta er fyrstu ferð, at føroyingar luttaka, og tí at EM-kappingin nú hevur sjeyti ár á baki.

Úrslitið er, at kvinnuliðið nú eisini sleppur uppí part.

## Nógv venjing

Bridgesambandið krevur nógv av teimum leikarum, ið hava ætlanir um at sleppa við til EM. Teir skulu venja nógv hvørja viku, og skipað verður fyri eini venjingarlegu til Danmarkar um páskirnar.

– Tá sleppa spælararnir at royna seg ímóti sterkum donskum og týskum liðum, sigur Mortan Rasmussen, ið er formaður í FBS.

Hann metir tað vera sera umráðandi hjá bridgeleikarum at hava møguleikan at royna seg í altjóða kappingum. Hetta gevur teimum møguleika fyri menning innan sína ítrótt.

Tað er tí neyðugt hjá føroyskum spælarum at vera við í altjóða kappingum eisini fyri at geva ungum leikarum høvi at samanbera seg við aðrar bridgespælarar.

## Savna pening

Tað er sera kostnaðarmikið at vera við í slíkum kappingum, og Bridgesambandið væntar at skula útvega einar 150.000 krónur til EM-ferðina. Í vár verður farið undir tiltøk at útvega neyðuga peningin.

Av tí at tvey lið verða send avstað dýrkar hetta munandi um ferðina. Ferðalagið, ið fer úr Føroyum, telur nú fimtan fólk.

Mortan Rasmussen fýlist á, at FBS ikki er á fíggjarlógini. Hann vísir á, at allar aðrar ítróttargreinar umframt talv, sum bridgespælarar ofta samanbera seg við, fáa stuðul á fíggjarlógini.

Hann heldur tí, at tað er sjálvsagt, at bridge eisini fær almennan stuðul.

Tilsamans tólv spælarar fara at luttaka í EM. Seks menn og seks kvinnur. Hjá kvinnum er longu avgjørt, hvør sleppur við á ferðina. Tær verða Arnleyg Mikkelsen, Marjun Restorff, Jóna Gunnveit, Majken Johansen, Marianna Eystberg og Elise Holm.

Hjá monnum er enn ikki endaliga avgjørt, hvør á landsliðið. Trý pør vera við, men fýra pør mugu berjast um plássini. Pørini eru Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen, Arnbjørn Sivertsen og Hans Jákup Petersen, Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen, Árant Berjastein og Magni Jøkladal.

Vant verður dúgliga komandi mánaðirnar, og leikararnir venja m.a. hvørt fríggjakvøld við danska landsliðnum, og hetta verður gjørt á internetinum. Svend Nourup er landsliðsvenjari hjá føroyska landsliðnum, og hann fylgir við í venjingini á internetinum.

# FCK styrkir hópin

**Nýggjasti leikarin hjá FCK er svenski verjuleikarin Tomas Antonelius. Hann kemur úr enska felagnum Coventry**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Spælarar fara og aðrir koma ístaðin. Seinastu vikurnar hava Todi og teir sagt farvæl við átta leikarar, meðan fýra nýggir eru komnir ístaðin.

Nýggjasti styrkurin hjá FCK er Tomas Antonelius. Hann hevur spælt við Coventry seinastu tvey árini, men hann hevur ikki megnað at vinna sær fast pláss á liðnum. Tí skiftir hann nú til FCK í vón um at fáa fleiri minuttir á vøllinum.

Antonelius, ið er 29 ára gamal, hevur spælt fimm landsdystir fyri Svøríki, og hann vónar sjálvsagt at endurvinna plássið á landsliðnum undan HM-kappingini í summar.

Hann hevur áður spælt við AIK Stockholm, har hann var við at vinna meistaraheitið og steypakappingina.

Sviin, sum fyrr hevði eftirnavnið Gustafsson, hevur gjørt ein trý ára sáttmála, men tað verður ikki upplýst, hvussu nógv FCK hevur latið fyri leikaran.

Hann skal vera avloysari fyri Thomas Rytter á høgra bakki. Rytter spælir nú við Wolfsburg í Týsklandi.